# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Flúgvandi byrjan



*Fagnaðurin var ovurstórur, tá tvær stafettir á rað vissaðu føroyingum gull. Eitt perfekt punktum á fyrsta svimjidegnum*

*Mynd: Jákup*

**Við trimum gull-merkjum fyrsta dagin næstan tjóv-startaði føroyska svimjilandsliðið á oyggjaleikunum**

SVIMJING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Vónirnar vóru har, men tað vórðu eingi lyfti givin. Føroyska svimjilandsliðið tykist í ár sterkari, enn tað nakran tíð áður hevur verið, og tí hevur verið tosað um, at talan skuldi verða um satt gullregn.

Sjálvirhøvdusvimjararnir tó roynt at skrúvað nakað niður fyri vónunum, og tí varð tosað um, at vunnu Føroyar eini fimm gullmerki, so skuldu vit vera nøgd.

Men tá stafettin hjá monnunum longu á fyrsta svimjidegnum hevði tikið triðja føroyska gullið, hvarv smædni eitt sindur.

- Eg vil ikki lova nakað sum helst. Men hetta var ein flúgvandi byrjan frá okkum. Og vit fara so at gera alt tað, sum vit eru mentir, so talan verður um fleiri gullmerki, segði Kristian Olsen, tá gullið var heima.


*Mánakvøldið varð Merkið vundið í húnarhátt fyri fjórðu ferð*

## Heiðursmerkjabýtið

Eftir næsta kappingardagin á Rhodos, eru Føroyar nummar seks í røðini yvir samlaða heiðursmerkjabýtið. Higar til hevur talan verið um fýra gullmerki, og við fleiri kappingum, har vónin er gull, er ikki óhugsandi, at vit kunnu styrkja um okkara støðu í samlaða yvirlitinum.

**Listin sá soleiðis út mánakvøldið**

| Nr | Land | G | S | B | Nr | Land | G | S | B |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Jersey | 7 | 10 | 4 | 6 | Føroyar | 4 | 7 | 2 |
| 2 | Rhodos | 7 | 5 | 8 | 7 | Áland | 4 | 1 | 3 |
| 3 | Guernsey | 5 | 5 | 8 | 8 | Bermuda | 3 | 4 | 5 |
| 4 | Gotland | 5 | 3 | 2 | 9 | Prince Edw. | 3 | 0 | 5 |
| 5 | Cayman | 5 | 1 | 0 | 10 | Isle of Man | 2 | 3 | 6 |


*Randi Kúrberg náddi ikki í finaluna sum hon annars hevði ætlað sær*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Misnøgd við gott úrslit

**Bara einaferð áður hevur Randi Kúrberg fingið betri úrslit enn hon fekk í gjár. Tað rakk tó ikki til finalupláss og tí er hon misnøgd**

SPJÓTKAST
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið kappaðist Randi Kúrberg í spjótkast. Hon hevur ment seg nógv seinastu tíðina, og bara í ár hevur hon bøtt um kast sítt við trimum metrum. Men støðið síðani seinastu oyggjaleikir er hækkað rættiliga ógvusligt, og tað sást millum annað aftur í tí, at kravið til finalupláss hesaferð var góðan metur hægri enn tað, sum gav bronsuheiðursmerkiseinast. Kravið var, at spjótið varð kastað góðar 38 metrar, men tá longsta kastið hjá Randi var 34,84 metur, so var hetta ikki nóg mikið. Tað skal tó sigast, at bara einaferð áður hevur Randi fingið eitt betri úrslit, og tað var til kapping uttanlands fyrr í ár, tá hon tveitti omanfyri 36 metur.

Tað gekk eisini sum ætlað, tá hon tveitti tey bæði fyrstu spjótini, men tveitast skuldi fyri triðju ferð, var neyðugt hjá henni at satsa, um hon skuldi fylgja við hinum, og tá miseydnaðist kastið.

Persónliga vóru úrslitini tó góð, men kortini Randi rættiliga misnøgd, tá hon var liðug at tveita.

– Eg veit ikki hvat eg skal siga, og tá tað er soleiðis er tað nokk tí, at eg ikki eri serliga nøgd, segði Randi. Erliga greiddi hon frá, at hon hevði roknað við einum finalusessi.

– Ikki minst tá tað vóru 14 luttakarar seinast, og eg kom í finaluna tá, meðan tað hesaferð einans vóru tiggju. Men eg kom ikki í finaluna, og setti heldur ikki føroyskt met, so beint nú er lítið at fegnast um, staðfesti fámælta Randi Kúrberg.